


**Nr. 9** ***27. apríl 2025*** **85. árg.**

# Dreymurin

*„... við tað at teir av nýggjum krossfesta sær sjálvum Guds son og gera hann til spott.“ Hebr. 6,6.*

Ein maður, sum kallaðist Alexander og búði í Skotlandi, lá eina náttina og droymdi. Hann stunaði og eymkaði seg í dreymi, so konan at enda skumpaði undir hann og spurdi, hvat ið hann droymdi, síðani hann gav seg so. „Á,“ segði hann, „eg havi havt ein ræðuligan dreym. Eg droymdi, at eg var staddur inni í landshøvdingaborgini, tá ið Pilatus tók Jesus í forhoyr.

Á, tað var ræðuligt, hermenninir tóku eina tornakrúnu og trýstu hana niður yvir høvur hansara. Tornarnir stungu seg inn í høvdið, og eg sá blóðið renna oman eftir andliti hansara. Teir spýttu á hann og slerdu hann í andlitið.

So kom ein stórur, førur hermaður har, og hann hevði ein langan koyril í hondini, sum hann læt súsa niður yvir Jesus. Koyrilin beit seg inn í ryggin og læt eitt opið sár eftir sær, og eg sá, hvussu blóðið fleyt niður eftir likami hansara. Ferð eftir ferð læt hann koyrilin súsa gjøgnum luftina niður yvir Jesus. Men Jesus segði einki.

At enda orkaði eg ikki longur, men rópti: „Steðga, steðga, tú mást ikki sláa hann meir!“ Men hermaðurin lætst ikki um vón. Eg leyp yvir til hansara og skuldi skræða koyrilin út úr hondini á honum, men til onga nyttu. So royndi eg at snara hermanninum á, so eg kundi síggja andlit hansara. At endanum eydnaðist tað. Á,“ suffaði Alexander og turkaði sveittan av pannuni, „veitst tú, hvønn eg sá? – Meg sjálvan! Hermaðurin var eg sjálvur. Á, sum tað var ræðuligt!“

Veitst tú, at Jesus pínist enn? Hvørja ferð, vit lúgva, stjala ella eru ónd móti okkara medmenniskjum, pínist Jesus. Hann hevur sjálvur sagt: „Sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær.“ Matt. 25,40. Slært tú eitt menniskja, so er tað Jesus, tú hevur sligið. Lýgur tú um onkran, so er tað Jesus, sum pínist av hesum.

Men Jesus elskar okkum øll. Hann læt ikki upp munn sín móti hermanninum, sum sló hann. Hann er kærleiki. Kom tí til hansara, júst sum tú ert, við øllum tínum brekum og tínari neyð. Hann tekur ímóti tær, fyrigevur tær, gevur lívi tínum innihald og gevur tær kraft at liva fyri seg.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hann gevur okkum alt

*„Hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll, hví skuldi hann ikki eisini geva okkum alt við honum?“ Róm. 8,32.*

Tá ið Amerika kom upp í fyrra veraldarbardga í 1917, tók ríkisstýrið stig til at heiðra tey heimini, sum sendu synir sínar at berjast fyri land sítt. Fløgg vórðu gjørd, sum kundu heingjast upp í vindeyguni. Ein silvurstjørna var á flagginum fyri hvønn son, ið var í vápnatænastuni. Bleiv ein av teimum ungu monnunum dripin, var silvurstjørnan útskift við eina gullstjørnu. Foreldrini vóru erpin av at vísa hesi fløggini fram.

Eitt kvøldið, tá ið ein pápi og lítli sonur hansara spákaðu gjøgnum gøturnar í einum lítlum býi, taldi drongurin stjørnurnar í teimum ymsu vindeygunum.

„Hygg, pápi,“ rópti hann og peikaði á eitt lítið hús, „tríggjar stjørnur í vindeyganum.“ Eina løtu seinni legði hann bilsin afturat: „Men hygg at hasum stóra húsinum við ikki so mikið sum einari stjørnu. Hvussu ber tað til, pápi?“

„Jú, tú veitst, góði, í summum familjum eru dreingirnir ov ungir at fara í kríggj, so sjálvandi hava tey einki flagg. So eru tað aftur summi foreldur, sum eru bangin fyri at senda synir sínar í kríggj og upphugsa allar møguligar mátar, so teir kunnu sleppa undan at verða innkallaðir.“

Teir hildu á at spáka og komu til tær opnu markirnar, har eingi hús vóru. Hetta klára, stilla kvøldið sóu teir kvøldstjørnuna, sum skein so bjørt í vestri.

„Á, pápi," rópti drongurin heilt uppøstur, „tað er ein stjørna í Guds vindeyga. Er tað av tí, at hann eisini gav ein son?"

„Ja, ja," svaraði pápin. „Gud gav son sín, sín einasta son."

Ja, niður frá øllum tryggleikanum í himli, sendi Gud Jesus til henda krígsherjaða heim, har hann var í vanda fyri ikki at orka at standa ímóti Satans álopum. Á Golgata heyggi doyði hesin sonurin, so hann fekk borið sigur til Guds børn.

Eftir sum Gud hevur givið okkum son sín, heldur tú so, at hann fer at nokta okkum nakað, sum hann sær er gott fyri okkum? Eftir sum hann hevur givið ta størstu gávu, sum gevast kann, man hann so sýta okkum smærri signingar?

Gevur Gud treyðugt og óvilliga? Versið sigur, at við Jesusi gevur hann okkum villiga allar lutir. Teir eru okkara, um vit taka ímóti soni hansara. Fyri Jesu skuld vil Gud hoyra og svara bønum okkara. Síðani hann hevur givið okkum so nógv, hvussu nógv eru so vit villig at geva honum?

*„Reach out" 30. juni. – Effie Campbell* umsetti.

# Hvat gjørdi tað við tey?

Á páskastevnuni í Meinigheitshúsinum kom talarin inn á tey, sum stóðu við Jesu kross, tá ið hann varð krossfestur, og hvat ið henda hendingin gjørdi við tey. Har vóru fleiri einstaklingar og bólkar av fólki.

Hin fyrsti var herhøvdingin. Tá ið hann sá tað, sum hendi, gav hann Gudi æruna og segði: „Av sonnum var hesin maður rættvísur!" (Luk. 23,47). Jesus var rættvísur, fullkomiliga uttan nakra synd. Hann skiftir um við okkum, hann átekur sær alla heimsins synd og gevur okkum sína rættvísi. Hetta er ikki eiti á býti. Hann gevur okkum – teimum, sum vilja taka ímóti tí og siga honum takk – eitt kvittað skuldabræv. (Kol. 2,14). Herhøvdingin vitnaði nú um Jesus, at hann var rættvísur.

So eru tað mannamúgvurnar, sum vóru saman komnar at síggja hesa sjón, tær slógu seg fyri bringuna og fóru avstað aftur. (Luk. 23,48). Einaferð var tað ein, sum sló seg fyri bringuna, og tað var tollarin í templinum. Jesus segði, at hann fór rættvísgjørdur heim. Hann eyðmýkti seg og játtaði synd sína og segði: „Gud náði meg syndara." Fjøldin á Golgata slær seg fyri bringuna og vendir sær síðani burtur. Hará lá munurin. Tey játta einki, biðja ikki um náði, men venda bakið til og fara.

Allir kunningar hansara og tær kvinnur, sum høvdu fylgt honum úr Galileu, stóðu langt burtur frá og hugdu at hesum. (Luk. 23,49). Jósef, ein ráðsharri, fær nú dirvi, og hann fer beint inn til Pilatus og biður um at fáa Jesu likam. Tað fær hann, og hann sveipar tað inn í línklæði og leggur tað í eina grøv, høgda inn í klettin, sum eingin hevði ligið í áður. (Luk. 23,50–53).

Jødarnir koma til Pilatusar og biðja um, at beinini av teimum krossfestu máttu verða brotin sundur. (Jóh. 19,31). Hetta eru myrkursins maktir, sum eru upp á spæl, og hetta er beinleiðis sataniskt. Byrjanin til páskirnar stavar frá teirri tíðini, tá ið ísraelsmenn fóru út úr Egyptalandi. Tá fingu teir at vita, at teir skuldu ofra eitt lýtaleyst lamb, og at einki bein av tí mátti verða brotið. (2. Mós. 12,46). Jesus varð tikin í forhoyr, og nógvir spurningar vórðu settir honum; men teir máttu sanna, at hann var lýtaleysur, har var einki at finnast at. Um teir nú sleppa at bróta beinini í Jesu likami, so kundi Jesus ikki gerast Guds offurlamb, sum ber burtur synd heimsins, tí Gud hevði kravt, at einki bein mátti verða brotið í tí. Tá høvdu vit verið illa stødd og farið eftir høvdinum niður í fortapilsið. Men tíbetur sigur Skriftin: „Hermenninir fóru tí og brutu beinini bæði í hinum fyrra og hinum øðrum, sum høvdu verið krossfestir saman við honum. Men tá ið teir komu til Jesus og sóu, at hann longu var deyður, brutu teir ikki bein hansara.“ (Jóh. 19,32–33). Halleluja!! Tí gjørdist Jesus Guds offurlamb, og Jóhannes doyparin kundi rópa úti í oyðimørkini: „Sí, Guds lambið, sum ber (ella: tekur burtur) synd heimsins!“ (Jóh. 1,29). Hevur tú takkað honum fyri tað?

*Effie Campbell.*

Gud svarar altíð bøn. Hann kann geva trý ymisk svør, og kunnu tey samanberast við ferðsluljósini. Hann kann svara: Nei. Tað ger hann, tá ið hann sær, at hatta verður okkum at skaða seinni. Tað er hitt reyða ljósið. Hann kann svara: Bíða. Tá sær hann, at best er at bíða eitt sindur, tí tá nært tú størri gleði av svarinum. Tað er tað gula ljósið. So kann hann svara: Ja. Tá fáa vit tað, ið vit biðja um beinanvegin. Tað er hitt grøna ljósið.

*e.c.*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27. apríl | **Tekstur:** | Luk. 18,9-14 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,7 |
| 4. mai | **Tekstur:** | Matt. 14,22-34 | **Bíbliuorð:** | Matt. 14,27 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 10** *11. mai 2025* **85. árg.**

# Hvat hevur tú?

Uttan mun til, hvussu lítið tú heldur, at tú hevur, gev so Gudi tað. Eingin sum Hann kann fáa okkurt stórt burtur út tí, sum lítið er. Móses bleiv kanska størsti leiðarin nakrantíð, tá ið hann í 40 ár leiddi jødiska fólkið gjøgnum oyðimørkina til Lovaða Landið.

Hetta var ein ferð við nógvum trupulleikum, men tað var eisini ein ferð við dagligum undrum, har tey fingu mat, vatn og skógvar og klæðir, sum ikki slitust. Tey fingu ein eldstólpa at hita seg við um náttina – og eitt skýggj at verja seg móti sólarhita um dagin. Móses man hava hugsað aftur á tann dagin, tá ið hann móður, vónsvikin, gamal og málleysur stóð við stavi sínum framman fyri Gudi. Tað var har, at ferðin við øllum undrunum byrjaði:

Vil tað siga, at Gud brúkar ikki menniskju, sum hava høga útbúgving við nógvum førleikum at bjóða Gudi? Jú, sanniliga, Gud brúkar øll sløg av menniskjum. Men Gud vil ofta gera okkurt við tað menniskja, sum hevur nógvar førleikar, so hann ella hon ikki lítur á sínar førleikar, men á Gud.

Gud kundi havt kallað Móses, tá ið hann var 30 ár, ungur, sterkur og væl skúlaður í hovinum hjá Fárao. Men Gud bíðaði, til Móses var 80 ár og næstan liðugur. So vísti Gud, hvat ið Hann kann gera gjøgnum eitt sovorðið menniskja.

Saulus hevði høga útbúgving, ágrýtni og karismu. Men Guds kall til hansara, tá ið hann seinni fekk navnið Saul, gekk hond í hond við, at Himmalsins ljós myndaliga talað brendi Paulusar kunnleika og religión burtur. Frá tí løtu hevði Paulus bara eitt ynski: At kenna Kristus – og at gera Hann kendan. (Les. Áps. kap. 9 og Fil. 3,1–11).

Tá ið Saul úr Tarsus byrjaði sín ríðitúr til Damaskusar at seta tey kristnu í fongsul, var hann lærdur, erpin og hevði stórt sjálvsálit og var braneggjaður. Tá ið hann møtti Guds ljósi á ferðini, fall hann á knæ ræðslusligin og blindur – og í máttloysi bleiv hann eitt undurfult amboð í Guds hond. Hann skrivaði uml. 28% av Nýggja Testamenti.

*Effie Campbell* umsetti.

### Syng fyri honum, sum doyggja nú skal

***Lag:** „Ungdómsins lukka.“*

*1.* Syng fyri honum, sum doyggja nú skal,
gev honum tankar, sum styrkja hann væl,
før ei mót dýpi hans bivandi sál,
lyft hann við sangi mót himmalsins mál'.

*2.* Okkurt vil pína og tyngja hans ferð,
allar hans roynslur og hvør ljót ein gerð,
okkurt vil níva og særa hans sinn.
Lyft hann við sangi í himmalin inn.

*3.* Kanska hann ikki ein einasta dag
gleðina fann mitt í vinanna lag',
kanska hann einsligur, syrgjandi fór.
Lyft hann við sangi til einglanna kór.

*4.* Boyggj knø við song hansar', bið í hans stað',
syng, til hann friðinum fyllist við. Ja,
lat undir tónum hans lív fjara út.
Lyft tú við sangi hann so inn til Gud.

*Hjalmar Hansen. – Effie Campbell* umsetti.

## Syng fyri tí sál, sum ferðaboð hevur fingið

### Um henda sangin skrivar høvundurin, Hjalmar Hansen, soleiðis:

Eg sá tey ein dagin líka sum í einum dreymi – øll hesi kæru, brøður og systrar, sum eftir at hava stríðst og strevast eina langa viku á virkjum, verkstøðum og skrivstovum, sunnudagarnar taka gittaran ella fara við kóri sínum út á sjúkrahúsini og syngja

fyri teimum, sum stóðu við byrjanina til ta longu ferð, haðani eingin vendir aftur. Eg gjørdist so bergtikin av hesi sjón, at eg mátti seta meg niður at skriva okkurt til teirra. Tað, sum eg fekk, gjørdist tá ein áheitan til teirra at hjálpa teimum, sum stríddu teirra seinasta stríð.

*Effie Campbell* umsetti.

# Í dag klokkan trý

***Dr. Kurt E. Koch, Doktari í teologi***

*Eg havi nakrar ferðir sagt frá einari hending, sum fór fram í Russlandi eftir kríggið.*

Martin, ein drongur, sum hevði sínar røtur í Ravensburg-vekingini, var í einari legu uppi við Íshavið. Teir týsku fangarnir gróvu eina veit út til Íshavið. Teir diddaraku kropparnir doyðu í túsundatali í hungri, vesaldómi og kulda. Martin fall ikki í fátt. Hann uggaði vinmenn sínar við orðum úr Nýggja Testamenti, sum hann hevði smuglað inn við sær, og hann bað eisini saman við teimum. Hann var vónarinnar rødd í vónloysinum og hópandlátunum. So gjørdist hann sjálvur ússaligur. Ein morgun kundi hann í sínum veikleika ikki arbeiða longur. Tveir vinmenn blivu sitandi hjá honum. Fyrrapartin segði hesin avmaktaði drongurin: „Í dag klokkan trý kemur Harrin og førir meg heim.“ Ein tími fyri og annar eftir fór. Ásettu tíðina hugdi Martin upp móti himli. Hann sá okkurt, sum var ósjónligt fyri báðar vinmenninar. At enda rætti hin doyggjandi seg upp, rætti armarnar út og rópti: „Harri, eg komi!“ So sakk hann niður aftur. Hann slapp nú at síggja tað, sum hann hevði boðað og trúð uppá.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eitt løgið vitni

Í Aschehougs K. Leksikon stendur skrivað um summarfugla-fiskin: Einasta slag av egnari undirskipan av sildafiskunum. Um leið 10 cm langur og livir í tropiskum V. Afrika. Glógvandi litir í grønum, gulum, reyðum og ljósareyðum...

Ein sovorðin fiskur varð veiddur í Dor Es Saloome í Tanzania og verður nú kallaður „bønarfiskurin“. Hesin fiskurin, sum vanliga er nógv prýddur við ymiskum mynstrum, hevði harumframt eitt serligt mynstur á stertinum. Hetta serliga mynstrið var – sum øll hini mynstrini – í sjálvari skræðuni á

fiskinum, og mynstrið vísti seg at vera arabiskir bókstavir og orð.

> **Skriftin er staðfest av tveimum vísindaligum stovnum, og hetta eru orðini, umsett til føroyskt:**
>
> EINGIN GUD UTTAN GUD.
>
> **Eina ferð fyrr er ein sovorðin fiskur veiddur við arabiskum bókstavum, tá við áskriftini:**
>
> EIN ÁVARING FRÁ GUDI.

---

„Spyr tú neytini, tey skulu læra teg ... og havsins **fiskar**, teir skulu siga tær tað!" Job. 12,7–8.

*TF-blaðið. – Effie Campbell* umsetti.

---

At tykja synd í sær sjálvum er hin ringasti fíggindin ein kristin hevur at berjast ímóti. Um tú vilt missa kraftina at sigra, so byrja at tykja synd í tær sjálvum.

*e.c.* ums.

---

Hin moralska kumpasnálin hjá menniskjum sveiggjar uttan nakra fasta leið.

*e.c.* ums.

---

Tey bæði amboðini, sum eru bestu vápn móti brennivíns-djevlinum, eita: bøn og føsta.

*e.c.* ums.

---

Tað torførasta við hjúnalagnum er, at vit fáa tokka til eina persónligheit, men vit skulu liva við viljastyrkini hjá hesari persónligheit. Bíða tí heldur eftir Gudi! Vit fáa tað besta, tá ið vit líta á Guds tíðarætlan.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 11. mai | **Tekstur:** | Luk. 5,1-11 | **Bíbliuorð:** | Matt. 4,19 |
| 18. mai | **Tekstur:** | Luk. 10,25-37 Matt. 5,43-48 | **Bíbliuorð:** | Matt. 5,44 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74